# Nøvn

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum,
at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir,
abbi og langabbi

**Niels Christian Lisberg**
**fyrrverandi lærari, ættaður úr Fámjin**
**Búsitandi í Vestmanna**

andaðist týskvøldið, 88 ára gamal.

Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinum sunnudagin kl. 17.00 og jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mánadagin kl. 14.00.

***Fyri tey avvarðandi***
**Andrea**
**Kirstin og Dánjal Pauli**

Tey, ið vilja minnast Niels við blómum ella kransi, kunnu ístaðin lata Vestmanna kirkju eina gávu, konta í peningastovnunum.



## TØKK

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Kristoffur Juul Svøðstein**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk til prest, sangarar, berarar og kirkjutænarar.
Tøkk til tey, sum hjálptu til í sambandi við ervið.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Kærar heilsanir***
**Thomina,**
**Mathilda, Gimmi og Asta við familjum**

## TØKK

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu,
tá kæri pápi, verpápi abbi og langabbi okkara

**Johan Hendrik Husgaard**

andaðist og varð jarðaður.

Takk til Hera Joensen, prest, fyri hjálp og góð orð.
Ein sertstøk tøkk til starvsfólkið á Heimarustovu á Lágargarði, fyri at tit vóru so væl um hann, ta tíðina hann var har.

Ein hjartans tøkk til tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til í sambandi við jarðarferðina.

Takk fyri blómur, kransar og tær peningagávur, sum latnar eru Lágargarði.

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Líggjas, Wenzel og Fía**



## TØKK

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði pápi, abbi, langabbi og bróðir okkara

**Hans Debes Feilberg**

doyði og varð jarðaður.

Takk til familju, vinir og kenningar, sum vitjaðu og vóru um okkum við kærleika og umsorgan.
Takk fyri góð og troystarrík orð.
Takk til prest, kirkjutænarar, urguleikara, berarar, sangarar og gravarar.
Takk til tykkum mongu, sum bakaðu og góvu til ervið. Eisini ein stór tøkk til tykkum, sum hjálptu til við ervinum. Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og uppringingar. Og tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

***Familjunnar vegna***
**Maria, Jóhanna og Hákun**

# Havnarkórið konsert við felags kórsangi í Müllers Pakkhúsi

Dýrabiðidag – komandi fríggjadag – hevur Havnarkórið, sum í ár hevur sítt 45. virkisár, konsert í Müllers Pakkhúsi.

Skráin er fjølbroytt, umfatandi kórsangir og størri verk frá farnum árum, men eisini við onkrari føroyskari frumframførslu og við nýggjari kórperlum, sum kórið ikki hevur framført áður.

Lagt verður fyri við trimum av kórsatsunum hjá gitna danska komponistinum Vagn Holmboe til úrvaldar føroyskar yrkingar og kendum barnaskjaldri, sum hann hevur kórsett. Tínæst fylgja ørindir úr donsku fólkavísuni "Dronning Dagmar" við lagi, sum føringar gjøgnum øldir hava kvøðið á dansigólvi, og sum John Høybye – vælkendur eisini í føroyska kórheiminum – nýliga hevur lagt til rættis fyri kór.

Seinast á skránni fyri steðgin er kórsyrpan Lamento d´Arianna hjá Claudio Monteverdi - ivaleyst fremstur millum tónaskøld um 1600 – um vónloysi við sterkum og eymum kenslum hjá kongadóttrini Ariadnu, sum varð svikin av prinsinum Teseus, ið hon í sínum kærleika hevði bjargað úr deyðavanda.

Í steðginum fáa áhoyrarnir drekkamunn við køkubita afturvið og fáa eisini høvi til saman við kórinum "at syngja summarið inn" við einum tyssi av úrvaldum, kendum summarljóðum.

Eftir steðgin leggur kórið fyri við trimum kórsatsum eftir Sunleif Rasmussen, sum fylti fimti ár og varð fagnaður við heiðursprísi fyrr í vár. Eftir hetta koma tvey norðurlandaljóð, har tað seinna er tríggir av teim kendu "Fire Salmer" fyri kór og baritonsolo eftir Edvard Grieg. Eftir enn tveir úrvaldar europeiskar kórsatsir roynir gamla Havnarkórið seg við einum amerikanskum spiritual, sum ber á tað rytmiska borðið.

Solistar á konsertini verða Petra Iversen, Berghild Poulsen og sangvinur kórsins kendi danski opera- og oratoriisangarin Lars Thodberg Bertelsen.

Konsertin byrjar kl. 17.00.

### Kórferð til Suðurroyar

Umframt konsertina í Müllers Pakkhúsi fríggjadagin, dýrabiðidag, ger Havnarkórið konsertferð til Suðuroyar komandi vikuskifti. Við somu sangskrá sum omanfyri lýst hevur kórið tá konsert leygardagin kl. 19.00 í Vágs kirkju og sunnudagin kl. 15.00 í Tvøroyrar Kirkju.